## Mugu standa saman

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin var høvuðsrøðari á veðurfundinum World Business Sunmit on Climate Change, sum varð sett í Keypmannahavn í gjár. Høvuðsboðskapurin hjá Al Gore til teir 700 luttakararnar var, at tað er neyðugt at gera okkurt við veðurlagsbroytingarnar sum skjótast, og at heimsins leiðarar mugu standa saman, um nakað skal koma burturúr. -Tíðin er um at ganga undan. Vit mugu fáa batar longu í hesum árinum. Ikki næsta ár. Í ár. Klokkan gongur, og náttúran gevur ikki kreditt, segði Al Gore í røðuni í Bellacenstrinum. Al Gore gjørdi samstundis greitt, at altjóða veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn í desember verður sera týdningarmikil, men at tað verður trupult at finna eina loysn.



## Norðurkorea roynt kjarnorkubumbu

Norðurkoreanska stjórnin váttar, at landið hevur gjørt eina kjarnorkuroyndarspreinging. Tíðindini fingu alt fyri eitt stjórnina í grannalandinum Suðurkorea at halda kreppufund um støðuna. Suðurkoreanski jarðfrøðistovnurin sigur, at hann skrásetti ein skjálvta eins og frá einari spreinging undir jørð. Teir almennu fjølmiðlarnir í Noðurkorea siga, at royndarspreingingin er liður í landsins royndum at menna kjarnorkuvápnini, ið skulu verja landið. Eygleiðarar siga, at royndarspreingingin fer at økja spenningin millum Norðurkorea øðrumegin og Suðurkorea og USA hinumegin.

# Marklund og Nesbø vitja Rás2

**Hóskvøldið verða Liza Marklund og Jo Nesbø gestir í sendingini Hvonn Live á Rás2. Fólk fáa eisini høvi at heilsa upp á teir báðar stórseljandi rithøvundarnar og fáa bøkur signeraðar**

KRIMI-TREFF
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Svenska krimidrotningin Liza Marklund og norski krimiprinsurin Jo Nesbø vitja í vikuni í Føroyum.

Tey bæði koma til Føroya at verða við í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir hóskvøldið.

- Krimisøgurnar selja betur enn nakrantíð áður, og tí vilja vit geva føroyingum eitt heilt serligt krimikvøld við tveimum av best umtóktu krimi-rithøvundunum á okkara leiðum, sigur Eyðun Klakstein, sum er redaktørur av sendingini Hvonn Live.

- Vit fara at tosa við tey um, hvat skal til fyri at skapa ta góðu spenningssøguna og um teirra persónligu bakgrund til at skriva krimi á høgum stigi, sigur hann.

### Marklund

Liza Marklund er víðagitin, umstrídd og populer. Hennara átta spennandi krimisøgur um journalistin Annika Bengtzon selja stórt og hava vunnið fleiri virðislønir, og eisini í Føroyum telist Marklund millum best seljandi rithøvundarnar.

Liza Marklund er ættað úr Norðursvøríki, vann fram sum journalistur í Stockholm, starvaðist sum blaðstjóri, og endaði sum ein tann kendasti norðurlendski rithøvundin í nýggjari tíð.

### Nesbø

Norðmaðurin Jo Nesbø er ein av bestu krimi-rithøvundum í Europa í løtuni, og hann hevur fingið virðisløn fyri bestu skaldsøgu í Noregi seinastu tvey árini.

Jo Nesbø hevur givið sjey altjóða viðurkendar krimisøgur út, og søgurnar um detektivin Harry Hole eru týddar til 30 mál.

Nesbø hevði ungdómsdreym um at spæla fótbólt í Onglandi, og hann hevur sagt, at hernaðartænasta í Norðurnoregi lærdi hann sjálvdisiplin.

### Signera bøkur

Fólk sleppa eisini at heilsa upp á Lizu Marklund og Jo Nesbø, nú tey vitja í Føroyum. Eftir prátið við tey í Hvonn Live signera tey bøkur. Rit & Rák fer at selja krimi-bøkur hjá Marklund og Nesbø á Hvonn, og fólk kunnu fáa tær signeraðar.

Eisini fáa fólk møguleikan at seta Marklund og Nesbø spurningar í sjálvari sendingini, sum verður send millum klokkan 19.00 og 22.00 hóskvøldið.





*Liza Marklund og Jo Nesbø eru hóskvøldið gestir í sendingini Hvonn Live á Rás2*

# SIC endar væleydnaða konsertferð í Onglandi

**Hava spælt til 43 konsertir á europeiska meginlandinum og í Stórabretlandi í skjótt tveir mánaðir. Í kvøld verður spæt í Peterborough, í annaðkvøld í Nottingham, mikukvøldið í Birningham, og seinasta konsertin verður í Southampton.**

KONSERT
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið fingu londonbúgvar møguleikan at hoyra føroyskan rock, tá hann er bestur og harðastur. Tað er kendi bólkurin SIC, sum hevur verið á konsertferð í Europa nú í tveir mánaðir, ið loksins vitjaði bretska høvuðsstaðin. Konsertin var tann 43. á konsertferðini og var í einum av teimum heilt kendu konserthølunum, har fleiri av teimum góðu gomlu tónleikabólkunum fingu sína debut og gjørdust kendir eftir tað. Staðið var The Dublin Castle í Camden Town, Parkway 94. Hetta er eitt kult og legendariskt spælistað.

Hetta var hæddarpunktið á konsertferðini hjá SIC, sum skjótt hevur vart í tveir mánaðir. Fyrst vóru teir ymsa staðni á europeiska meginlandinum, og henda seinasta mánaðin hava teir ferðast úr Skotlandi fyri norðan og til Suðurongland. Spælt hevur verið í fleiri býum, og bókurin hevur sum heild fingið góða móttøku. Tað er ikki hvønn dag, at bretar og skotar hoyra føroyskar bólkar.

Konsertferðin hjá SIC endar hósdagin í South Hampton. Skráin fyri restina av túrinum er henda:

25.mai Peterborough
26.mai Nottingham
27.mai Birmingham
28.mai Southampton

Teir fimm SIC´ararnir koma heimaftur 29. mai. Heimafturkomnir verða teir partur av stóru tónleikatiltøkunum, sum Tórshavnar Kommuna skipar fyri. SIC verða so eisini við á fleiri av festivalunum í summar.

